FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Leiðslufundur 23. august 2016

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Turið Sigurðardóttir (TS), Hans Andrias Sølvará (HAS) Hans Pauli Joensen (HPS) og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 23. august 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Fíggjarstøða**

Fíggjarstøðan varð gjøgnumgingin. Umbøn um eykajáttan varð send Mentamálaráðnum tann 9. august 2016.

2. **Útbúgving í námsfrøðiligari leiðslu**

Mentamálaráðið hevur heitt á Setrið um at fyrireika og skipa fyri eftirútbúgving í námsfrøðiligari leiðslu fyri skúlaleiðarum í fólka- og miðnámsskúlum og møguliga øðrum leiðarum í skúlaverkinum eisini. Eftir ætlan verður útbúgvingin fyrireikað heystið 2016 og byrjar 1. februar 2017.

Áheitanin varð umrødd.

3. **Vísindavøka**

Setrið er farið undir at fyrireika luttøkuna á Vísindavøku, sum verður í Reinsarínum tann 30. september. Virksemið og tiltøkini verða skipað sum tema, har stovnarnir kunnu samstarva, so til ber at vísa eina røð av vísindaligum disiplinum í sama evni. Í ár verður denturin lagdur á evnini: Eld, luft, vatn og jørð. Harumframt verður eitt øki til stereoluppar og mikroskop, har til ber at vísa alt møguligt frá ymsum stovnum, kanska skiftandi gjøgnum dagin. Kanska kallast hetta "smáveruhornið".

JM setir seg í samband við møgulig umboð frá Setrinum.

## 4. Grønlendsk ministaravitjan

Mala Høj Kúko, orku- og umhvørvisráðharri í Grønlandi, kemur á vitjan á Setrinum fyrrapartin 7. september. Ráðharrin ynskir at verða kunnað um orkuverkfrøði á Setrinum, og ætlanirnar við Lindsbergshúsi.

**Kunningarmál:**